Viðmerking til løgtingslógina um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (Berarakanning fyri fólk millum 18 og 45 ár og makar hjá berarum)

Vit í áhugafelagnum Arvasjúkan taka fult undir við løgtingslógini um berarakanning fyri fólk millum 18 og 45 ár og makar hjá berarum. Vit takka fyri høvið at viðmerkja og vilja lýsa verandi støðuna (uttan eitt lógartryggjað tilboð um berarakanning) frá sjónarhorninum hjá familjum, ið eru raktar og teimum, sum eru í vandabólkinum.

Fyrst fáa vit deyðasjúk børn, so tilboð um hjálp

Soleiðis sum støðan er í dag, fáa foreldur í Føroyum eitt deyðiliga sjúkt barn í føvningin, og finna soleiðis útav, at tey eru berarar av einari deyðiligari ílegusjúku.

Einari ílegusjúku, sum ikki kann lekjast ella viðgerast, og førir við sær nógva líðing og sorg, bæði fyri barnið sjálvt og familjuna.

Ein berarakanning fyri tær seks deyðiligu ílegusjúkurnar, sum ikki kunnu viðgerast, kann fyribyrgja hesi støðuni.

Ein berarakanning kann staðfesta, um fólk í burðarførum aldri eru í vanda fyri at fáa eitt barn við lívshættisligari ílegusjúku, áðrenn tey koma so langt at fáa sær børn. Í fall eitt par er í vanda fyri at fáa eitt barn við ávísari ílegusjúku, eiga tey at fáa alla ta kunningina tey hava tørv á, fyri at taka eina avgerð um, um tey ynskja hjálp til at fyribyrgja sjúkuni og hvussu tey ynskja at fara fram.

At varveita støðuna sum hon er í dag kann illa forsvarast, serliga tí, at vit:

- kenna neyvt til allar tær deyðiligu ílegusjúkurnar, sum ikki kunnu lekjast ella viðgerast;
- vit vita, hvussu ofta tær koma fyri (og at um fimti hvør føroyingur ber ein ella fleiri ílegufeilir, sum elva til hesar sjúkurnar);
- og tøknin, sum skal til fyri at gera berarakanningar, er atkomulig og ikki kostnaðarmikil.

Í dag fáa nøkur upplýsing og tilboð - og onnur ikki

Bara tey, sum longu vita um, at ávísar deyðiligar ílegusjúkur eru í familjuni, fáa tilboð um at kanna seg. Teir mongu føroyingarnir, sum óvitandi bera deyðiligar ílegusjúkur, og tí kunnu fáa børn við hesum sjúkunum, fáa ikki sama tilboð um at kanna seg.

Løgtingslógin um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið skapar líka atgongd fyri allar føroyingar í burðarførum aldri at kanna seg - eisini fyri tey, sum ikki hava sjúkurakt børn í familjuni.

Familjur fáa sálarløst fyri lívið

Lata vit standa til, vera berarapør framhaldandi óvitandi kastað út í vanlukkustøðuna at taka ímóti einum deyðiliga sjúkum barni. Barnið fær eitt stutt og sera trupult lív, og sálarligu og kensluligu fylgirnar fyri foreldrini eru ómetaliga stórar. Uttan berarakanning, loyva vit í Føroyum, at henda líðingin heldur áfram og skapa sálarløstir, sum kundu verið fyribyrgdir.

Fáa tað at vita ov seint

Í dag eru stór sannlíkindi fyri, at berarapør fáa sítt fyrsta barn við ílegusjúku, tá tey eru í tretivunum. Mannagongdin fyri at fáa hjálp til at fáa frísk børn við t.d. eftirgjørdum gitnaði er hvørki skjót ella líkatil, kann taka nøkur ár og vera sera kostnaðarmikil. Jú fyrr eitt par kann avdúka, at tey eru í vanda fyri at fáa børn við álvarsligari ílegusjúku, jú betri. Hetta gevur teimum góða tíð til at fáa hjálp. Verandi støða forðar fyri, at berarapør, sum gerast foreldur seint í lívinum, fáa ta hjálpina, tey ynskja, rættstundis.

Sosiobúskaparliga byrðan og ójavnin

Uttan berarakanning standa familjur í Føroyum møguliga fyri stórari kensluligari og fíggjarligari byrðu, sum kemur av strongdini og kostnaðinum av at hava umsorgan fyri einum deyðiliga sjúkum barni, sum krevur røkt alt samdøgrið. Hendan støðan kann raka tey harðast, ið ikki hava umstøður til at bera hesar byrðarnar. Hetta skapar aftur størri ójavnvág í samfelagnum. Við berarakanning kundu vit skapt størri javnvág og fyribyrgt, at summi koma undir hetta órímiliga stóra trýstið.